## Stjørnuskotið

**Jóhan Petur á Stongunum hevur við fleiri framúr avrikum strítt seg inn í øll føroysk flogbóltshjørtu á oyggjaleikunum**

SAMRØÐA
*Álvur/Jákup*

Leikarin við størsta frambrotinum á mansliðnum í flogbólti hevur uttan iva verið Johan Petur á Stongunum, sum hevur havt leiklutin sum libero. Serliga í móttøkunum hevur hann verið stinnur, og sjálvur fegnaðist hann eisini um, at tað hevur gingist somikið væl.

- At eg nú skal sleppa at spæla við í eini finalu er bara heilt fantastiskt. Tað er nakað, sum vit allir hava stríðst fyri, og sum eg eisini gleði meg til.

Spurdur, hvørt tað ikki kundi gerast strævið, tá tú alla tíðina skalt nýta kreftir upp á at savna bóltar upp av gólvinum, segði Johan Petur, at tað var tað sjálvandi.

- Summar dystir hevur tað verið heilt strævið, men soleiðis er tað bara. Og móttøkurnar eru eisini nakað, sum skal rigga, um vit skulu gera okkum nakrar vónir í finaludystinum. Eg havi ikki sæð so nógv til Saaremaa, men tað, sum eg havi sæð, vísir, at teir kunnu leggja stórt trýst á. Hvør tann eisini leikari hjá teimum hoppar við servuna, so vit skulu veruliga spæla upp til okkara besta í tí dystinum. Og gera vit tað, so ivist eg ikki í, at vit eisini hava møguleikan at vinna, segði Johan Petur á Stongunum at enda.

Føroyar - Áland 3-1 (17-25, 25-21, 25-7, 25-18):

# Skinklaðu eitt sindur


*Føroysku flogbóltskvinnurnar spældu seg hósdagin í finaluna í flogbólti. Tær møta Sareema*

**Hósdagin var hálvfinalan í kvinnuflogbóltinum avgreidd. Føroysku kvinnurnar vunnu dystin ímóti Álandi 3-1, men í støðum rillaðu føroysku kvinnurnar eitt sindur. Tær skulu møta Saaremaa í finaluni**

FLOGBÓLTUR
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Hósdagin vórðu báðar hálvfinalurnar hjá monnum og kvinnum avgreiddar, og vórðu Føroyar umboðaðar í báðum hálvfinalunum. Føroysku kvinnurnar møttu Álandi, og vunnu tær dystin 4-1.

Fyrsta settið byrjaði væl. Føroysku kvinnurnar komu á odda 5-1, og tóktust tær tryggar í spælinum, og sá tað út til, at tær stevndu beina leið ímóti finaluni.

Men so kom vend í. Áland setti ferð á, og nógvir býttir feilir kostaðu føroysku kvinnunum nógv stig.

Vantandi kommunikatión, og trýstið frá Álandi gjørdist størri, sum setti leið. Áland arbeiddi væl á gólvinum og fangaðu nógvar bóltar. Og hetta botnaði í, at tær komu skjótt framum 14-19.

Mistøkini vóru ov nógv, og ov nógvar ringar móttøkur vóru hjá føroyska liðnum, so illa bar til at fáa spælið at koyra.

### Vend í

Í øðrum setti hildu kvinnurnar frá Álandi á, har tær sleptu. Móttøkurnar hjá føroysku kvinnunum hildu áfram við at vera ringar og feilirnir vóru ov nógvir.

Einasta álopið føroysku kvinnurnar fingu ígjøgnum var á miðjuni.

Men sum annað settið leið, komu føroysku kvinnurnar betri og betri við. Mistøkini hvurvu so smátt, og móttøkurnar gjørdust betri. Kantarnir byrjaðu eisini at vinna, og endaði tað við, at annað settið vunnu føroysku kvinnurnar 25-21, eftir at hava verið afturút17-21.

Triðja settið vísti sanniliga, hvat føroysku kvinnurnar kunnu, tá tær spæla uppá sítt besta. Móttøkurnar vóru góðar, og servurnar eisini, og megnaðu tær á henda hátt, at seta álendska liðið undir stórt trýst. Nú var tað øvugt, og tað var Áland, sum gjørdi feilirnar, og vunnu føroysku flogbóltsleikaranir settið heilið 25-7.

Fjórða, og sum seinni vísti seg at gera tað seinasta setti, líktist nógv tí næsta. Føroysku kvinnurnar komu framum, men høvdu ilt við at rista álendingarnar rættiliga av sær. Men til endans bragdaði og var fagnaðurin í fullsettu høllini stórur, tá føroysku kvinnurnar fingu 25. og seinasta stigið og sostatt vunnu dystin 3-1.

### Nøgdur

Føroyski venjarin, Niclas Joensen, segði eftir dystin, at hann var væl nøgdur. Í øllum førum higartil.

– Vit byrjaðu fyrsta sett væl, men so var tað líkasum vit steðgaðu eitt sindur upp. Eg haldi, at tær vóru nervøsar. Ístaðin fyri at spæla sum eitt lið, so spældu tær sum einstaklingar, sigur Niclas Joensen.

– Nakrar útskiftingar vórðu so gjørdar og tá fingu vit spælið aftur upp at koyra.

Føroysku flogbóltskvinnurnar skulu, eins og menninir, møta Saaremaa í finaluni, og er føroyski venjarin rættiliga bjartskygdur.

– Vit hava vunnið tær seinastu tvær ferðirnar vit hava spælt ímóti teimum. Vit hava tikið hina hálvfinaluna upp á band, og nú fara vit heim at fyrireika okkum. Men um vit skulu vinna, so skulu vit ikki spæla fyrsta sett sum vit spældu tað í dag.

At enda kann nevnast, at Anna Müller Jacobsen verður helst ikki klár til finaluna, sjálvt um hon hevði væntað, at verið klár týsdagin. Niclas Joensen sigur, at hon hevur ikki verið við nakran dyst, og at hon hevði uttan iva verið góð at havt við á liðnum.

Føroyar-Bermuda 3-0 (25-21, 25,21, 25-19):

# Dupultuppgerð móti Saaremaa

**Eins og kvinnurnar vunnu menninir sína hálvfinalu í flogbólti, og eins og hjá kvinnunum stendur Saaremaa nú fyri framman**

FLOGBÓLTUR
*Álvur/Jákup*

Eftir evstamark okkara fríggjadagin skuldi føroyska manslandsliðið í flogbólti spæla finaludyst móti Saaremaa.

Hetta gjørdist greitt, tá teir hósdagin vunnu hálvfinaluna á Bermuda. Bermuda var at kalla tann ókendi faktorurin í mansflogbólti hesaferð, nú teir sum spildurnýggir luttakarar vóru við á Oyggjaleikunum.


*Bermuda megnaði ongan tíð at skapa veruliga trupulleikar hjá mansliðnum í flogbólti, og Føroyar eru nú til reiðar at spæla finaludyst móti Saaremaa*

### Greiður sigur

Tað var tó skjótt greitt, at tað var føroyska liðið, sum var sterkari. Alt fyri eitt fingust móttøkurnar at rigga, har serliga Johan Petur á Stongunum stóð sterkur, og tá Bárður so eisini hevði ein góðan dag á hevaraplássinum fingu Føroyar veruliga skapt eitt gott trýst móti Bermuda.

Eitt skifti komu mótstøðumenninir tó inn aftur í dystin, tá stóru menninir alt betri lærdu at flyta blokkin yvir móti føroyska álopsspælinum, men hóast tað ongan tíð skrædnaði millum liðini, so kom Bermuda ongan tíð upp á liðina av okkara.

Sigurin kundi kanska verið meira sannførandi, um okkara høvdu satsa minni í servunum og havt betri tol, tá bóltar skuldu avgerast, men hóast hetta, so vóru nógvir hugaligir lutir at síggja í føroyska spælinum. Ikki minst at tað nú so langt ífrá bert var Rúna Weihe, sum bóltarnir vórðu sendir ímóti kann gerast ein stór styrki í finaludystinum móti Saaremaa, har tað heilt víst fer at hava stóran týdning, at álopsspælið kann varierast.

At landsliðsvenjarin ongar útskiftingar framdi ígjøgnum dystin, men alla tíðina koyrdi við teimum somu seks + Johan Petur sum libero, kann benda tann vegin, at tað ikki fer at vera rúm fyri ov nógvum skiftum í finaludystinum. Kanska vildi venjarin eisini bara síggja, hvørt leikararnir vóru førir fyri at halda høvdið kalt allan dystin, og tað sýndu teir so eisini, at teir kundu. Eisini hóast sinnini onkun tíð komu í kók, tá dómarin ikki altíð vildi døma tað sama, sum okkara vildu.

Tað er tó slíkt, sum kann henda í ítrótti, og so er bara at vóna, at teir marginalarnir eisini vóru í okkara parti, tá finaludysturin varð leiktur fríggjadagin.



Badminton:

# Fór eftir bronsuni

**Føroyski badmintonspælarin, Ragnar Rasmussen, var hósdagin sligin út í einstaklingakappingini í badminton. Hann tapti ein tættan og spennandi dyst 1-2 ímóti Frank Bagger frá Grønlandi**

BADMINTON
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Tað var ein vónbrotin Ragnar Rasmussen sum kom av vøllinum eftir ein tættan og spennandi badmintondyst hósdagin.

Ragnar spældi ímóti Frank Bagger frá Grønlandi, og endaði tað við, at Ragnar tapti dystin 1-2 við settúrslitunum 15-10, 12-15 og 12-15.

– Tað kiksaði í teimum avgerandi støðunum. Tað var tætt, men sum eg havi sagt, so kann eg ikki brúka tað til nakað um dysturin er tættur, og eg havi tapt, segði Ragnar beint eftir dystin.

– Eg var gott á veg at vinna, og eg var sannførdur um, at eg fór at vinna í morgun, men tað gekk so ikki.

Sum útgangsstøði tekur Ragnar Rasmussen ein dyst í senn.

– Á Isle of Man fór eg eftir bronsuni, og tað fór eg eisini her, men nú er tað yvirstaðið fyri meg, sigur Ragnar, sum sær vónbrotin út, og ikki er nakað serliga prátingarsamur.

– Gloppið millum okkum og hinar badmintonspælararnar veksur og veksur. Vit betra okkum ikki nóg nógv, meðan hinir betra seg meira og meira. Men fyri mítt viðkomandi kann eg bara siga, at tað er upp til okum sjálvar, hvat vit gera við tað. Eg royni at offra tíð og pengar uppá tað, tí tað tekur tíð at gerast góður til badminton.


*Ein vónbrotin Ragnar Rasmussen var hósdagin sligin út úr kappingini í einum tøttum dysti ímóti Grønlandi*

Frammanundan oyggjaleikunum venur Ragnar í eini tveir til tríggjar mánaðir miðvíst fram ímóti kappingini.

– Vit hava eina FM-kapping, sum liggur væl fyri, so tað er ein góð fyrireiking. Men tað er ikki fyrr enn 2-3 teir seinastu mánaðirnar, at ein roynir at geara seg upp til oyggjaleikirnar, sigur Ragnar Rasmussen, sum at enda leggur afturat, at oyggjaleikirnir saman við Lið-VM er tað størsta fyri føroyskar badmintonspælarar.

Mannfólka dublan í badminton varð annars eisini sligin út hósdagin, har Erland Poulsen og Ragnar Rasmussen taptu 1-2. Somuleiðis við blandaðu dubluni. Guri Poulsen og Erland Poulsen vóru sligin út við einum 1-2 tapi.

# Bogi í finaluni

**Bogi Lenvig rann seg hósdagin í finaluna á 1.500 metra teininum**

RENNING
*Álvur/Jákup*

Eitt av bestu føroysku kortunum í frælsum ítrótti er uttan iva Bogi Lenvig, sum longu hevur vunnið eitt bronsumerki. Hetta var á 5.000 metrum, og hósdagin skuldi hann so royna at renna seg í finaluna á 1.500 metrum.

Bogi var her í øðrum heati, og talan um eina spennandi renning, sum eisini var sera taktisk. Mesta partin av teininum fylgdust rennararnir í einum stórum bólki, men seinasta hálva umgangin fóru nakrir at draga frá. Bert tríggir teir fremstu vóru vísir í at koma í finaluna, og tá 100 metrar restaðu, var Bogi framvegis á fjóðra plássinum.

Her gjørdi hann tó ein ordans vørr, og fór spelandi fram við einum guernsey búgva, soleiðis at finalusessurin varð tryggjaður við eini tíð, sum var gott hálvt sekund betri enn hjá næsta manninum.


*Á seinastu hundrað metrunum setti Bogi Lenvig ferðina upp, og fór framvið Guersney-búgvanum, sum fram til tá hevði verið á triðja plássinum*

Finalan í kappingini varð runnin eftir evstamark okkara, so úrslitið av hesum má tíverri bíða til týsdagin.

# Vit hava eitt gott lið

**Rúni Weihe var væl nøgdur um føroyska avrikið í hálvfinaluni, sum hóast tað kundi verið betri, aftur undirstrikaði, at Føroyar hava eitt lið, sum tað við røttum kann roknast nakað av framyvir**

SAMRØÐA
*Álvur/Jákup*

Tað var ein væl nøgdur føroyskur liðskiparin, sum eftir dystin hósdagin kundi staðfesta, at nú vóru Føroyar komnar í báðar flogbóltsfinalurnar.

- Tað er jú, man altíð vil vera, og tá tað nú er nakað síðani, at tað seinast eydnaðist, so er tað kanska eyka søtt hesaferð, helt Rúni Weihe, tá vit fingu orðið á hann.

- Og eg haldi eisini, at vit eiga tað uppiborið. Vit hava eitt gott lið í ár, har hópurin eisini er breiður, soleiðis at vit tola, at nøkur skift verða framd. Vit spældu kanska ikki so gott í dag, men vit vunnu sannførandi 3-0, og dysturin móti Álandi sýndi eisini, hvat vit eru førir fyri, so higartil er tað bara fínasta slag.

Og verður hugt at hópinum, so sæst eisini, at hetta er eitt lið, sum væl kann gera seg galdandi í fleiri ár framyvir. Sæð burtur frá veteraninum, Odd Eliasen, so er talan um leikarar, sum enn hava nógv ár eftir í sær, og Rúni var eisini samdur í, at hetta so avgjørt taldi tann rætta vegin.

- Tað vórðu jú fleiri útskiftingar gjørdar á seinastu leikunum, og hesaferð hava vit so aftur einar tríggjar nýggjar leikarar við, so at vit standa okkum somikið væl, tað er bara deiligt, staðfesti liðskiparin.

### Gera okkara besta

Meðan føroysku leikararnir avgreiddu sína hálvfinalu, leikti Saaremaa seg í finaluna á hinum vøllinum í flogbóltshøllini. Spurdur, hvørt Rúni heldur hevði vilja hitt Áland í finaludystinum, sigur Rúni, at tað sum so kann vera tað sama.

- Saaremma eru í øllum førum sterkir. Eg haldi eisini sjálvur, at teir eru betri í ár, enn teir vóru á Man. Teir hava tó fleiri nýggjar leikarar við, og tað kann vera, at hesir ikki hava somu royndirnar til avgerandi dystirnar, men tað mugu vit so bara taka, sum tað kemur. Spæla vit upp til okkara besta, so kunnu vit ikki gera meira enn tað, helt Rúni Weihe at enda.


*- Dysturin móti Álandi sýndi eisini, hvat vit eru førir fyri, so higartil er tað bara fínasta slag*

# Silvur á hálvum marathon


*Eftir at mamman hevði verið burtur í 20 kilometrar var tað gott at fáa eitt klemm*

**Borgarhjørt Holm misti bronsuna á seinasta umganginum, men saman við fimta plássinum hjá Rigmor N. Arge var hetta kortini nóg mikið at tryggja liðnum silvur á hálva marathon-teininum**

1/2 MARATHON
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Hálvi marathon-teinurin var á skránni hjá kvinnunum fríggjamorgunin. Her høvdu Føroyar Rigmor N. Arge og Borgarhjørt Holm við í kappingini, og tað var eisini skjótt greitt, at tær báðar ætlaðu sær at vera við hampuliga langt frammi.

Fyrra helmingin av teininum fylgdust tær báðar, men tá Rigmor spakuliga fór at merkja okkurt í legginum, fór Borgarhjørt avstað í jagstranini eftir bronsuni. Tað eydnaðist henni eisini at renna seg upp á triðja plássið, men á seinastu runduni inni á stadion-økinum misti hon tó leiðsluna.

- Ytsta geilin á breytini var avmerkt, so helt, at vit skuldu renna her úti, tá vit komu á stadion. Brádliga sá eg tó, at ein rennari kom í innaru geilini, har teinurin kring vøllin jú er styttri, og tað kostaði mær bronsuna. Tað var nú einki serligt, men tað gerst so ikki við. Silvur fyri liðið er eisini gott, og tað velji eg heldur at fegnast um, segði Borgarhjørt.

Hóast lítla skaðan, sum hon altso merkti nakað til, so megnaði Rigmor at halda sítt fimta pláss allan teinin, og sjálvsagt var hon ovurfegin um, at tað hevði eydnast liðnum at vinna silvur.

- Tú setir jú altíð nøsina upp eftir heiðursmerkjum, men tú kanst ongan tíð vita, um hetta er rætti dagurin. Tað er eisini so í slíkum kappingum, at tú bara rennir eftir plaseringum. Teinurin hevði annars hóska væl til eina góða tíð, men hvat. Liðið fekk jú silvur, so skít verið við restini, segði ein troytt – men ovurfegin – Rigmor N. Arge, júst innkomin á málið.


*Hóast lítla skaðan, so megnaði Rigmor at halda fimta plássinum og harvið silvurmerkinum í samlaðu liðkappingini*